# *Búmerkjakapping*

Deyvafelag Føroya hevur samtykt, at felagið skal hava nýtt búmerki, og í hesum sambandi skipar felagið fyri eini búmerkjakapping

**Øll kunnu luttaka**
Felagið hevur gjørt av at øll skulu kunnu luttaka í kappingini, t.v.s. at bæði limir í Deyvafelagnum og onnur t.d. myndlistaáhugaði, designarar og onnur eru vælkomin at senda inn teirra uppskot.

**Kappingartreytir**
**Nakrar treytir ella leiðbeiningar eru viðvíkjandi búmerkinum:**

- T.d. skal liturin/litirnir síggjast hóast send verður yvir telefax. Sostatt kunnu ikki nýtast alt ov ljósir litir.
- Búmerkið skal lættliga kunna kennast bæði í stórari og lítlari útgávu. Tað skal vera vælegnað at nýta á brævpappíri, brævbjálvum, visitkortum og web.
- Ongar serstakar treytir eru viðvíkjandi sniði/symbolismu til búmerkið. Ávíst samljóð kann vera millum búmerkið o deyvleika: eitt eygnabrá, evt. kroppsmál ella hendur, ið vísa eitthvørt tekin á teknmáli, ella tað kann vera reinur tekstur evt. saman við einihvørjari mynd.
- Búmerkið skal vera eyðmint og eyðkennt! Tað skal umboða/ímynda felag teirra deyvu í Føroyum, og ta verju Deyvafelagið stendur fyri teirra vegna.
- Støddin á innsenda búmerkinum skal vera minst 10 x 10 cm. Tað kann vera á vanligum pappíri, sum kann scannast inn til seinni nýtslu. Um búmerkið verður innsent í elektroniskum formati, skal tað helst gerast í Illustrator EPS ella aðrari vectorskrá (t.d. Freehand), PDF min. 300 dpi, Photoshop EPS min 300 dpi ella líknandi.

**Tíðarfreistin**
Uppskot til búmerki, ið skulu luttaka í kappingini, mugu verða **Deyvafelag Føroya, Postboks 2001, 165 Argir,** í hendi í seinasta lagi 12. mars.

Deyvafelagið tekur sær rætt til ikki at brúka nakað av innkomnu uppskotunum og/ella evt. at broyta/menna innkomin uppskot.

Hvat er at vinna?
Vinnarin av kappingini verður kunngjørdur í bløðunum einar tríggjar vikur eftir seinastu freist, og fær **vinningin uppá kr. 5.000,-** handaðan við samkomu í Deyvahúsinum.

Spurningar viðvíkjandi kappingini kunnu setast til Deyvafelagið á Telefon 317597, á telefaksi 313609 ella á teldupostadressu: deaf@deaf.fo

Deyvafelag Føroya

Sosialurin 341800

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktar-frøðingur

## til cardiologisku starvsstovuna

Á **cardiologisku starvstovuni** er eitt hálvtíðar avloysarastarv leyst at søkja til setan 1. mars 2004 ella eftir avtalu til og við 28. februar 2005.

**Arbeiðsøkið í høvuðsheitum:**
- at hjálpa til við diagnostiskum virksemi innan A-EKG, Ekko, Holter og pacemakarum
- røkt og ráðgeving til hjartasjúklingar
- arbeitt verður í tøttum samstarvi við aðrar fakbólkar

**Førleikakrøv**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- faklig vitan og royndir við at viðgera og røkta hjartasjúklingar
- góð samstarvsevni
- hug til tvørfakligt samstarv
- fleksibilitetur og kreativitetur
- góður røkjuskapur
- vil søkja mennandi avbjóðingar
- førleika fyri at arbeiða sjálvstøðugt, og aktivt alla tíðina kunna søkja sær nýggja vitan innan arbeiðsøkið
- teldukunnleika

**Fyrimun hava umsøkjarar sum**
- hava cardiologiska eftirútbúgving
- eru vanir at arbeiða sjálvstøðugt
- hava rímuligan førleika í enskum í skrift og talu

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- eitt sera áhugavert og avbjóðandi starv, har møguleikar eru fyri upplæring og menning
- starvssetti flytur við, tá starvsstovan flytir í nýggja med. amb. í nýbygningin.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til starvstovuna tlf. 313540, lokal 371, ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 300 ella e-post asap@lsh.fo

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Skivlig umsókn við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

Umsóknarfreistin er 24. februar 2004 kl. 12.00.

# Skeið

Síðsta freist at melda til grundskeiðið er týsdagin 10. februar 2004.

Skeiðið er fyri nevndarlimir, álitisfólk og limir hjá Føroya Arbeiðarafelag.

Tilmelding fer fram hjá lokala limafelagnum.

**Føroya Arbeiðarafelag**



**Fáið meira burturúr**
við okkara fiskiútgerð

**Línuspøl og egnidraktir o.o. útgerð**

**Íslendskar snellur - bæði 12 og 24 volt**

**Fa. Jóannes F. Dahl**, Maskinsmiður,
Tlf: +298 422 274, Fax: +298 422 189, Mobil: +298 221 000,
dam-dahl@post.olivant.fo, 460 Norðskála, Føroyar

Umboð fyri VAKI DNG

# Mitzubishi Pajero

2,5 Turbo diesel Jeepur. Árgangur 89. Koyrt 132.000 km. Sýnaður 2003. Setur aftan

Í sera góðun standi til sølu fyri 36.000,- kr

**Tlf. 219110**

veitst tú ikki tað?

Sosialurin
-tað loysir seg

# Erogterapeutur/ Fysioterapeutur til Hjálpartólamiðstøðina (HTM)

Á HTM er eitt fyribilsstarv sum Ergoterapeutur/Fysioterapeutur leyst at seta beinanvegin. Setanartíðin verður 3 - 6 mánaðar.

HTM er deild á Almannastovuni og umsitur hjálpartól, umbyggingar í heiminum og avlamisbilar til fólk, ið bera brek. Í løtuni starvast 14 fólk á HTM.

**Uppgávurnar hjá HTM umfata m.a.**
- upplýsing, ráðgeving og leiðbeining til brúkarar, almennar myndugleikar o.o. um hjálpartól og byggi- og bústaðarspurningar
- útlán og endurnýtsla av hjálpartólum
- viðgerð og støðutakan til umsóknir um sertillagað hjálpartól, bústaðarbroytingar og avlamisbilar.
- tvørfakligt samstarv - innan- og uttanhýsis

**Vit sóknast eftir einum starvsfelaga sum hevur:**
- útbúgving sum ergoterapeutur / fysioterapeutur
- royndir frá líknandi arbeiði er ein fyrimunur
- góð samstarvsevnir
- telduførleika á brúkarastøði

**Vit kunnu bjóða:**
- sjálvstøðugt arbeiði
- flextíð
- tætt samstarv við starvsfelagarnar
- samskifti við viðskiftafólk
- fakligt mennandi umhvørvi

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen leiðara á HTM tel. 358300.

Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum og viðmerking um hvørt av starvinum søkt verður um skal sendast til

**Hjálpartólamiðstøðina**
Postboks 1049
110 Tórshavn

**Umsóknarfreist:** 23. februar 2004 kl. 14.00.

# Teknikari til KT-deildina

**Søkt verður eftir einum teknikara til KT-deildina at byrja skjótast tilber.**

**Starvið**
Vit bjóða eitt áhugavert starv við góðum arbeiðsumstøðum. Tú kemur saman við tveimum øðrum teknikarum at taka tær av rakstrinum av servarum og teldum við meira hjá Tryggingarfelagnum Føroyum. Tilsamans eru umleið 140 teldur og 15 serverar at umsita. Starvið fevnir eisini um brúkaraleiðbeining.

**Førleikakrøv**
Vit ynskja, at tú hevur eina viðkomandi kt-útbúgving sum datanom, datamatikari ella líknandi, og í minsta lagi 2 ára royndir innan rakstur av MS Windows 2000/2003 servarum. Royndir innan rakstur av Windows 2000/XP klientum eru eisini neyðugar. Harafturat er tað ein fyrimunur, um tú hevur royndir við Exchange og Office produktum.

Dentur verður lagdur á góð samstarvsevni, og at tú ert fyrikomandi og kann arbeiða sjálvstøðugt.

**Umsókn**
Umsóknir, saman við prógvum og viðmælum, skulu verða starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 20. februar 2004.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til Jónsvein Simonsen, deildarstjóra á kt-deildini á tel 345 551, ella við at senda teldupost til jos@trygging.fo

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Sansir 355 355

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Kongabrúgvin · P.O.Box 329 · FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Tel+298 345600 · Fax+298 345601 · tf@trygging.fo · www.trygging.fo

*Tryggingarfelagið Føroyar P/F hevur høvuðsskrivstovu á Kongabrúnni í Havn, og 5 deildir kring landið. Í felagnum starvast 126 fólk. Øll starvsfólk í felagnum fáa eina grundleggjandi tryggingarfakliga útbúgving, og verða víðariútbúgvin innan starvsøki teirra.*

CATERPILLAR



**442D RENNUGRAVARI**
**Fabriksnýggjur**
**Prísur uttan mvg. Kr. 498.000,-**

HYDREMA

**908ESD RENNUGRAVARI**
**Frá 1996 – 5750 tímar-renov** Seld



**906B RENNUGRAVARI**
**Frá 1991 – 5800 tímar-renoverað**
**Prísur uttan mvg. Kr. 305.000,-**

**808 RENNUGRAVARI**
**Frá 1989 – 5940 tímar**
**Prísur uttan mvg. Kr. 150.000,-**

**806 RENNUGRAVARI**
**Frá 1989 – ca. 6000 tímar**
**Prísur uttan mvg. Kr. 225.000,-**

***P/F ALMA***
***Maskinverkstaður & Smiðja***
Tlf. 31 58 90 Fax. 31 35 00
Mail: jan@alma.fo



SANSIR 355 355

Handilslærlingur til 3-aran

*Ur- og smúkkudeildin*
Vit sóknast eftir einum lærlingi til ur- og smúkkudeild okkara at byrja 1. mars.

Lærutíðin er 3 ár, og ein treyt er, at tú hevur FHS-prógv ella líknandi.
Í lærutíðini verður tú send/ur niður á 14 daga skeið/skúla 4 ferðir.

Vilt tú hava meiri at vita um starvið, ert tú vælkomin at ringja til Nainu, tel 353535.

3arin SMS · Postboks 1057 · FO-110 Tórshavn